## Sjey sekund frá milliónunum

Ein maður í Canada keypti í mai ein lottoseðil, sum at enda vann. Øll sjey tølini passaðu, men einasti trupulleikin var, at seðilin kom úr maskinuni sjey sekund ov seint. Maðurin keypti tríggjar seðlar og seinasti seðilin vann vinningin áljóðandi 66 milliónur krónur. Nú dregur maðurin spælifyritøkuna í rættin, tí vanliga eru maskinurnar seinkaðar eini tólv sekund, so maðurin var í veruleikanum fimm sekund áðrenn freistina. Sum vanligt handan hav, verður helst talan um eitt drúgt og dýrt rættarmál, men spennandi er tað heilt víst hjá manninum, sum – enn – er sjey sekund frá vinninginum.



# Heðin Zachariassen flaggar út

**Núverandi borgarstjóri í Sunda Kommunu, Heðin Zachariassen, hevur gjørt av ikki at stilla uppaftur til komandi kommunuval. – Mær hevur dámað væl sum borgarstjóri, men nú føli eg at tað er rætt at steðga, sigur Heðin Zachariassen**

KOMMUNUVAL
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*- Mær hevur dámað væl at verið í kommunustýrinum og at verið borgarstjóri. Men ein er tíðin at byrja, og ein er tíðin at steðga, sigur Heðin Zachariassen.*

Eftir at hava sitið 16 ár í kommunustýrum, fyrst fýra ár sum kommunustýrislimur, síðan átta ár sum borgarstjóri í Hvalvíkar Kommunu, og tá kommunan varð løgd saman við hinum bygdunum til Sunda Kommunu, sum fyrsti borgarstjóri í nýggju felagskommununi, heldur Heðin Zachariassen nú at tíðin er komin at steðga.

- Eg havi hugsað um tað í eina tíð nú, og eg føli at eg havi givið kommununi nógv. Men nú føli eg at tað er rætt fyri bæði meg sjálvan og kommununa at steðga, og tí havi eg gjørt av at ikki stilla uppaftur, greiðir Heðin Zachariassen frá.

Heðin Zachariassen varð fyrstu ferð valdur inn í kommunalpolitikk í ringastu krepputíð, nevnliga í 1992, tá hann gørdist bygdaráðslimur og varaborgarstjóri í Hvalvíkar Kommunu. Í 1997 gjørdist hann borgarstjóri í Hvalvíkar Kommunu, og tað starvið røkti hann til og við 2004, tá Hvalvíkar Kommuna varð løgd saman við Sunda Kommunu. Í 2005 gjørdist hann borgarstjóri í Sunda Kommunu, og tað starvið hevur hann so røkt tey seinastu fýra árini.

- Orsøkin til at eg nú taki meg aftur er ikki at eg havi kett meg í starvinum sum borgarstjóri, tvørturímóti, men heldur at eg haldi at tað er rætt at steðga eftir 16 árum og at geva øðrum kjansin at sleppa framat, leggur Heðin Zachariassen dent á.

### Hevur dámað væl sum borgarstjóri

Um tíðina, sum Heðin Zachariassen hevur verið í kommunalpolitikki, hevur hann bara gott at siga.

- Mær hevur dámað væl at verið í kommunustýrinum og at verið borgarstjóri. Tað hevur verið sera áhugavert og eg haldi sjálvur at eg havi givið nógv til kommununa. Men ein er tíðin at byrja, og ein er tíðin at steðga, sigur Heðin Zachariassen.

Eftir øllum at døma er tann tíðin nú komin hjá borgarstjóranum í Sunda Kommunu. Men maður kemur í manns stað.

- Tað er umráandi at tað eru fólk, sum síggja møguleikarnar í Sunda Kommunu, sum koma inn, tí møguleikarnir eru nógvir. Eg haldi at har er eitt stórt potentiali í kommununi, og tað er umráandi at fólkini sum koma inn síggja møguleikarnar, vísir Heðin Zachariassen á.

### Umráðandi at fáa øll við

Heðin Zachariassen er ein royndur maður í kommunupolitikki og eftirhondini eisini í landspolitikki. Harafturat hevur hann drúgvar royndir í vinnulívinum. Tí komandi borgarstjóranum kann Heðin Zachariassen tí geva nøkur góð ráð við á vegnum.

- Sum borgarstjóri stendur tú á odda fyri tí, sum fólkini ert saman við eru samd um. Tað er umráandi tá tú ert borgarstjóri, at tú gert tær greitt, at tú ert bara ein útav mongdini, og at tað er umráðandi at fáa hini við. Borgarstjórin skal eisini mynda kommununa úteftir, og tá er umráandi at hann fær hini at føla seg sum ein part av tí, sum fer fram í kommununi. Hann skal eisini læra seg at brúka pressuna, tað er ein partur av at vera borgarstjóri at vera í samband við pressuna, sigur Heðin Zachariassen, fráfarandi borgarstjóri í Sunda Kommunu.

# Fer at røkja egnar fyritøkur

**Nú Heðin Zachariassen fer frá sum borgarstjóri í Sunda Kommunu, fer hann at nýta ta eyka tíðina til at røkja egnar fyritøkur og at røkja løgtingsarbeiðið**

KOMMUNUVAL
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Heðin Zachariassen hevur verið løgtingsmaður síðan 2002, og er nú aftur inni í hitanum har. Harumframt fer hann at nýta eyka tíðina til at røkja egnar fyritøkur*

Umframt at hava verið virkin í kommunupolitikki og landspolitikki seinastu árini, hevur Heðin Zachariassen eisini nakrar fyritøkur við síðunaav, sum hann nú fer at nýta meira tíð til at røkja. Saman við tveimum øðrum eigur hann fyritøkuna Atlantic Pane í Kollafirði, og fyrr í ár gjørdi hann eina stóra íløgu, tá hann fekk tillutað bussleiðirnar leið 400 og leið 450.

- Eg fari nú at brúka størri tíð til at taka mær av mínum egnu fyritøkum. Mær dámar væl at taka mær av teimum og at vera í vinnulívinum, og tí fari eg nú at brúka meira tíð til tað, sigur Heðin Zachariassen.

### Raðfestir løgtingsarbeiðið

Heðin Zachariassen hevur verið virkin í landspolitikki síðan 2002, tá hann varð valdur inn á listanum hjá Fólkaflokkinum. Hann hevur verið limur í Vinnunevndini síðani 31. mai 2002, varalimur í Uttanlandsnevndini, Útnorðurráðnum og Landsstýrismálanevndini í tíðarskeiðnum mai 2002 til januar 2004. Hann hevur eisini verið varalimur í mentanarnevndini, trivnaðarnevndini og landsstýrismálanevndini síðani februar 2004.

Men á løgtingsvalinum 19. januar í ár varð hann ikki valdur innaftur á tingið, men stóð sum eykamaður. Fólkaflokkurin kom tá ikki í samgongu, men síðan tá er nógv broytt, og nú tá Fólkaflokkurin aftur kom í samgongu í farna mánaði og fekk trý landsstýrisfólk, er Heðin Zachariassen aftur inni í hitanum í Løgtinginum.

Hann fer nú eisini at nýta tíðina til at raðfesta løgtingsarbeiðið komandi hálvtfjóðru árini.